Jákup Mikkelsen skjýtur upp:

# SVF og ÚF í sama posa



*- Í einum so lítlum samfelagið sum okkara kann tað ikki vera rætt, at tveir so stórir og kostnaðarmiklir stovnar dagliga kappast um tíðindi, og tað hevði verið bæði bíligari og kvalitativt betri við eini samanlegging av ÚF og SVF, sigur Jákup Mikkelsen, tingmaður Fólkafloksins í Norðoyggjum, sum vónar at fáa undirtøku at gera uppskot um hetta*

**Løgtingsmaður Fólkafloksins, Jákup Mikkelsen, fer í nærmastu framtíð at senda Annitu á Fríðriksmørk í Mentamálaráðnum skrivliga áheitan at umhugsa samanlegging av Sjónvarpi og Útvarpi Føroya. – Bæði fíggjarliga og viðvíkjandi fjølmiðlagóðskuni eru stórir fyrimunir við eini samanlegging, sigur Jákup Mikkelsen, sum eisini vónar at fáa politiska undirtøku fyri einum ítøkiligum uppskotið um samanlegging av ÚF og SVF**

SAMANLEGGING
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

- Í einum so lítlum samfelagið sum okkara kann tað ikki vera rætt, at tveir so stórir og kostnaðarmiklir stovnar dagliga kappast um tíðindi, og tað hevði verið bæði bíligari og kvalitativt betri við eini samanlegging av ÚF og SVF.

Hetta sigur tingmaður Fólkafloksins í Norðoyggjum, Jákup Mikkelsen, sum í næstum fer at senda nýklakta mentamálaráðharranum Annitu á Fríðriksmørk skrivliga áheitan um samanlegging av stóru fjølmiðlastovnunum.

Jákup Mikkelsen vísir á, at í búskaparligu niðurgongutíðunum og sparingunum á fíggjarlógini, sum skjótt skal í tingið, er samanlegging av hesum báðum fjølmiðlastovnunum ein ítøkilig rationalisering.

Enn er ikki greitt, í hvussu stóran mun henda hugsan verður realiserað, og um talan yvirhøvur gerst um eitt ítøkiligt uppskot, men hetta er í øllum førum endamálið hjá Jákupi Mikkelsen, sum hevur reist málið ymsastaðni.

### Ov vánaligur tíðindaflutningur

Jákup Mikkelsen vísir á, at talan tó er um meiri enn bert ein fyrimun við hesi ætlan.

- Fyrst og fremst er talan sjálvsagt um sparingar við t.d. einum leiðslubygnaði og og færri fólki í arbeiði, men fjølmiðlagóðskan hevði avgjørt eisini hækkað undir einum felags stovni, sigur Jákup Mikkelsen.

Hann vísir á, at undir einum sjálvstøðugum stovni hevði ein samansetting av bestu journalistunum í sjónvarpinum og útvarpinum hækka støði í føroyska fjølmiðlaheiminum.

- Í løtuni hækkar góðskan í SVF ikki í samsvar við vaksandi útreiðslurnar, stovnurin nýtir, og umframt fíggjarliga sjónarhornið er áheitanin eisini við støði í kvalitetinum á tíðindaflutningi, sigur Jákup Mikkelsen.

Hann vísir á, at ein samanlegging á henda hátt hevði verið betri, effektivari og bíligari fyri lítla samfelag okkara, sum als ikki nýtist tveir stórar og kostnaðarmiklar stovnar, sum hvønn dag kappast um, hvør er fyrstur við tíðindum.

### Arbeiðir fyri parlamentariskum meiriluta

Umframt skrivið til Annitu á Fríðriksmørk hevur Jákup Mikkelsen reist spurningin bæði í Mentanarnevndini og Tingbólki Fólkafloksins, og hóast uppskotið ikki tóktist vinna frama í bræði, er hann bjartskygdur.

- Slíkt skal altíð fyrst upp at venda og tekur sína tíð hjá viðkomandi persónum at umhugsa, men eftir at hava reist málið ymsastaðni bæði sum sparingsætlan og sum hátt at hækka fjølmiðlastøðið vóni eg at fáa undirtøku, sigur Jákup Mikkelsen.

Sjálvur metir hann seg skula hava fleiri við sær, áðrenn eitt ítøkiligt uppskot kann leggjast fyri tingið, og ætlar tingmaður Fólkafloksins at arbeiða fyri parlamentariskum meiriluta fyri samanlegging av stóru og kostnaðarmiklu stovnunum, Útvarpi Føroya og Sjónvarpi Føroya.

- Sum mentamálaráðharri er Annita á Fríðriksmørk sjálvsagt ein lyklapersónur í hesi gongd, og mín vón er, at hon tekur undir við áheitanini at umhugsa ætlanina, so aðrir politikarar eisini taka við og talan kann gerast um eitt uppskot, leggur Jákup Mikkelsen dent á.

Tíverri varð ikki gjørligt at fáa viðmerking frá mentamálaráharranum Annitu á Fríðriksmørk áðrenn evstamark á blaðnum, men vónandi hava vit eina viðmerking frá henni skjótast gjørligt um ætlanina at leggja saman ÚF og SVF.



Útvarpsstjórin um samanlegging:

# - Sjálvstøðugir stovnar skapa trygd

**- Spurningurin um samanlegging av SVF og ÚF er politiskur, sum eg ikki kann taka støðu til, men við tveimum sjálvstøðugum stovnum er trygd fyri óheftum tíðindaflutningi, sum í løtuni altíð verður mettur um í tveimum støðum, sigur útvarpsstjórin Jógvan Jespersen**

SAMANLEGGING
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*- Tveir óheftir og sjálvstøðugir fjølmiðlastovnar tryggjar óheftan og fjøltáttaðan tíðindaflutning fyri borgaran, sigur útvarpsstjórin Jógvan Jespersen um møguliga samanlegging av SVF og ÚF*

Stjórin í ÚF, Jógvan Jespersen, ynskir ikki at leggja seg út í spurningin, um ÚF og SVF skulu leggjast saman ella ikki. Hann vísir á, at tað í seinasta enda er ein politiskur spurningur.

- Politisk avgerð varð tikin um hetta í 80´unum, og síðani tá hava ÚF og SVF ment seg sum tveir sjálvstøðugir og øðrvísi stovnar við hvør sínum fortreytum, sigur Jógvan Jespersen.

Útvarpsstjórin hevur tó sínar áskoðanir um, hvat ein møgulig samanlegging kann elva til og ikki.

- Eg dugi ikki at síggja, at tær stóru peningaupphæddirnar verða spardar við eini samanlegging, og tað er eftir mínum tykki ikki nóg gott grundarlag, vísir Jógvan Jespersen á.

### Trygdin í vanda

Útvarpsstjórin heldur, at líkamikið um talan er um tveir ella ein stovn, er neyðugt og týdningarmikið at hava tvær redaktiónir.

- Tað er altíð ein styrki at hava tvær redaktiónir, og tað er eisini tað, Danmarks Radio hevur gjørt. Miðskeiðis í ætlanini at leggja alt saman í eina redaktión legði nevndin upp í og gjørdi tað mótsætta, júst tí tað altíð er ein fyrimunur, at tíðindi verða vurderað á tveimum støðum, sigur Jógvan Jespersen.

Við hesum sigur ovasti myndugleiki útvarpsins, at við núverandi støðu í Føroyum er tíðindaflutningurin uppi at venda í tveimum sjálvstøðugum og óheftum fjølmiðlastovnum, og tað er altíð ein trygd fyri borgaran við óheftum og fjøltáttaðum tíðindaflutningi.

- Tískil kann trygdin fyri óheftum tíðindaflutningi koma í vanda við eini samanlegging, sigur útvarpsstjórin.

### DR móti føroyskum leisti

Sum áður nevnt hevur Danmarks Radio skilt útvarps- og sjónvarpsredaktiónirnar sundur, tí leiðslan vildi varðveita sunna kapping, og sambært útvarpsstjóranum fer fjølmiðlarisin í Danmark alt meiri móti føroyskum leisti.

- Við gongdini seinastu tíðina líkist bygnaður teirra alt meiri tí, vit hava her, júst tí sjálvstøðugu funktiónirnar tryggja óheftum og fjøltáttaðum tíðindaflutningi, vísir Jógvan Jespersen á.

Hann leggur tó dent á, at talan í seinasta enda er um ein politiskan spurning, har avgerð eisini má takast frá politiskari síðu.

Sjónvarpsstjórin um samanlegging:

# - Størri tap enn vinningur

**Ovasti myndugleikin í sjónvarpinum, Mikkjal Helmsdal, metir ikki, at fíggjarligi vinningurin er størri enn innihaldsliga tapið við eini samanlegging. – Dagliga kappingin millum ÚF og SVF økir um fjølmiðlagóðskuna, sigur Mikkjal Helmsdal**

SAMANLEGGING
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Við skrivligu áheitanini til Mentamálaráðið frá løgtingsmanninum Jákupi Mikkelsen tykist politiskur vilji vera fyri samanlegging av størstu fjølmiðlastovnunum, hóast tað ikki er greitt, hvørja undirtøku hetta fær, og um hetta yvirhøvur gerst til ítøkiligt uppskot, sum skal í tingið.

### Kappingin er mennandi

Meðan Jákup Mikkelsen vísir á bæði fíggjarligar og kvalitativar fyrimunir við eini samanlegging, sigur sjónvarpsstjórin Mikkjal Helmsdal hinvegin, at júst sundurskiljingin av SVF og ÚF er mennandi.

- Við tað at vit hvønn dag eru í kapping, setir tað hægri krøv til báðar stovnar, og tískil kann tað skaða støðið á tíðindaflutninginum, um talan gerst um ein stóran og einsamallan loftmiðil, sigur Mikkjal Helmsdal.

Stjórin í SVF leggur dent á, at fíggjarliga motivið at leggja stovnarnar saman ikki er nóg mikið.

- Við tað at umsitingin er so lítil bæði í ÚF og SVF, fáast fíggjarligar rationaliseringar ikki við eini samanlegging. Einasta rationella grundgevingin fyri eini samanlegging má tískil vera at vilja skapa ein so góðan miðil sum gjørligt, vísir Mikkjal Helmsdal á, sum tó ikki metir góðskuna hækka við eini samanlegging.

### Persónliga ímóti

Mikkjal Helmsdal vísir á henda hátt á, at sparingar ikki er nóg góð orsøk at

*- Fíggjarligi vinningurin er minni enn kvalitativa tapið við einum stovni, tí kappingin millum ÚF og SVF er mennandi, sigur Mikkjal Helmsdal, stjóri í SVF*

fremja hesa stóru broyting, og sjónvarpsstjórin dylur heldur ikki fyri, hvør persónliga áskoðan hansara er.

- Eg eri ikki kategoriskt ímóti eini samanlegging, men sum heild meti eg, at vinningurin við eini samanlegging er ov lítil samanborið við, hvat vit missa, og tískil eri eg ikki fyri eini samanlegging í løtuni, sigur ovasti myndugleikin í SVF.

Mikkjal Helmsdal heldur sostatt, at rationaliseringsvinningarnir við samanlegging ikki viga upp ímóti kvalitativa tapinum av føroyskum tíðindaflutningi.

### DR skilir redaktiónirnar sundur

Við áskoðan Jákup Mikkelsens kundi ein sæð fyri sær eitt líknandi Danmarks Radio, sum umsitur bæði sjónvarp og útvarp, men



Mikkjal Helmsdal vísir júst á mótsætta rákið.

- Danmarks Radio hevur fyri stuttum skilt sundur redaktiónirnar í útvarpi og sjónvarpi, tí størri vinningur fekst við hesum, og kunnu vit tí ikki nýta Danmarks Radio sum fyridømi fyri samanlegging, sigur sjónvarpsstjórin at enda.